TILFEINGIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, 4. mars 2026
J.nr. 26/05340

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Svar frá Eiriki í Jákupsstovu, landsstýrismanni, upp á § 52a-fyrispurning nr. 52-098/2025 frá Jacob Vestergaard, løgtingsmanni, um ognartøku av festijørð

Spurningarnir vóru soljóðandi:
1. Góðtekur og viðmælir landsstýrismaðurin, at Búnaðarstovan viðvirkar til ognartøku av almennari ogn/festijørð í hagapartinum Heimasti hagi norðaripartur í Skálavík?
2. Um ikki, ætlar landsstýrismaðurin so at taka nøkur stig í málinum?

Svarað verður undir einum:
Sambært § 12, stk. 1, í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir kunnu kommunur einans ognartaka privata jørð; sostatt ber ikki til at ognartaka festijørð.

Í sambandi við, at løgtingsvalið er útskrivað, hevur løgmaður heitt á landsstýrisfólkini um ikki at gera annað enn tað, sum er alneyðugt til tess at fyrisitingin kann halda fram ótarnað. Tískil verða ikki onnur stig tikin í málinum.

Tilfeingis- og vinnumálaráðið, 4. mars 2026

Eirikur í Jákupsstovu
landsstýrismaður